# Nýtir tú ov nógva olju?

Vit hava **25 ára royndir** og serkunnleika í **eftirbjálving**.

Vit blása við **leysari steinull**, ið liggur sera væl og **sjunkar ikki** sum árini ganga.

## Vit bjálva ÚTVEGGIR, INNVEGGIR, SKRÁVEGGIR, LOFT og GÓLV.

Bjálvað verður fyrst og fremst fyri at fáa eini heitari hús og á tann hátt spara orku. Eini væl bjálvað hús hava eisini aðrar fyrimunir.

- Steinullin bjálvar sera væl móti gangi. Bæði gangi uttanífrá og gangi millum hæddir.
- Gjósturin í húsinum hvørvur
- Húsini gerast hugnaligari og vaksa í virði
- Húsini gerast tryggari, tí at steinullin verjir móti eldi

Øll hús kunnu bjálvast, um tey eru av timburi ella betong – nýggj ella gomul.

Íløgan er skjótt spard inn aftur í oljunýtslu.



**Ring og fá meira at vita á telefon 319309 / 519309**

## HÚSABJÁLVING

v/ Julius Hammer ·Tel. 319309 / 519309

---



## Missiónsvikan í Leirvík
12. – 17. januar 2010

**Týsdagin 12. januar**
Kl. 20:00 Sylverius Jacobsen talar
Glyvrakórið syngur

**Mikudagin 13. januar**
Kl. 20:00 Óli Poulsen talar
Manskórið í Fuglafirði syngur

**Hósdagin 14. januar**
Kl. 20:00 Andreas Andreassen talar
Bethaniakórið úr Gøtu syngur

**Fríggjadagin 15. januar**
Kl.20:00 Reimund Langaard talar
Taborkórið á Toftum syngur
*Innsavnan til landsarbeiðið hjá HM*

**Leygardagin 16. januar**
Kl. 20:00 Pól Johannesen talar
KFUM&K Kórið í Klaksvík syngur

**Sunnudagin 17. januar**
Kl. 12:00 Gudstænasta v/altargongd
Kl. 14:30 Sunnudagsskúli
Kl. 18:00 Torleif Johannesen talar
Húsakórið syngur
*Innsavnan til Missiónshúsið*

Bønarløta verður hvørt kvøld ½ tíma áðrenn møtini byrja. Møguleiki verður fyri samtalu og forbøn. Drekka verður hvørt kvøld eftir møtini. Bókaborð Barnaansing fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið

*Komið, tí at nú er alt tilgjørt, úr Luk 14,17*

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

**Vælkomin at vitja okkara nýggju heimasíðu á leirvikar.fo**

**Missiónshúsið í Leirvík**
www.leirvikar.fo

---

DROTNING MARGRETHU BARNAGARUR v/ KFUM & K
Gerðagøta · FO-700 Klaksvík · Tel. 455557
Faks 457657 · margretha@margretha.fo · www.margretha.fo

# Pedagogar

**Vit søkja eftir 2 pedagogum, at starvast ímillum 30-40 tímar um vikuna, við børnum í aldrinum 3 til 7 ár, at byrja 1. februar (ella eftir nærri avtalu)**

**Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 og 17.30**

Dr. Margrethu Barnagarður er sjálvsognarstovnur, normeraður til 90 børn í aldrinum 0 til 7 ár. hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnunum og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Ein stovn í menning, hvar tú fart møguleikan at seta tín dám á dagligdagin.
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi.
- Skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur ábyrdarkenslu.

**Tú kanst fara inn á heimasíðuna www.margretha.fo**

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 11 / 18.

Meira fæst at vita við at venda sær til varðaleiðaran Súsannu Ziska á tlf. 455557

**Skrivlig umsókn við prógvi skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 25 januar, kl. 12.00.**

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
**Gerðagøta**
**FO – 700 Klaksvík**
**T-post margretha@margretha.fo**

---

## Rokningar mugu verða Sjúkrakassanum í hendi 15. februar 2010

Sjúkrakassarnir avgreiða nú rokningar, sum viðvíkja 2009 og seinasta freist at senda rokningar er 15. februar í ár.

**Blíðar heilsur**

**Meginfelag Sjúkrakassa Føroya**

---

## Frá Føroya Fiskimannafelag

Fundur verður á Klaksvíkar sjómansheimi týsdagin 12 jan. kl. 13.00

Á skránni fastlønarsáttmáli o.a.

Føroya Fiskimannafelag

---

KOYRIKORT?
EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið og RF-Skeið byrjar mikudagin 13. januar 2010 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

---

# Grundøki í Klaksvík

Planerað grundøki í Klaksvík til sølu um høskandi boð fæst. Liggur væl fyri mitt í býnum. Grundøkið er 1300$m^2$, herav 800 $m^2$ er planerað.

**Tlf. 457635 / 217635**
**best eftir kl.19.00**